# Enn fleiri íbúðir á Norðoyri

**BYGGING** Um ikki so langa tíð fer bygdin Norðoyri upp um 100 íbúgvarar, nú byggifelagið Norðhús hevur sett skjøtul á tær fyrstu seks íbúðirnar í bygdini, uttast á Borðoyavík. Gongst sum ætlað, kunnu fyrstu fólkini flyta inn komandi vár

Snorri Brend

Norðoyri: Fyrr í ár boðaðu tey hjá Norðhús frá ætlanini um at byggja seks íbúðir á Norðoyri, hvør uppá góðar 70 fermetrar.

Tað vísti seg beinanvegin, at væl gekst at selja hesar fyrstu íbúðirnar - ja, so væl, at tað vóru uppaftur fleiri sum høvdu áhuga í at ogna sær eina íbúð har.

Hesin stóri áhugin hevur aftur havt við sær, at byggifyritøkan í Klaksvík hevur í hyggju at fara undir næsta byggistigið.

- Tað hendir so skjótt sum nóg nógvir keyparar eru til íbúðirnar, og so skjótt sum fíggingin er komin uppá pláss, verður sagt.

Tað er Húsalánsgrunnurin í stendur fyri fíggingini av verkætlanini. Tó skal sigast, at Eik eisini er við.

- Hetta hevur verið ein ætlan, sum vit hava havt í longri tíð, men onnur arbeiði hava strongt so mikið á, at bíðað hevur verið við hesum líka inntil nú, siga stjórarnir í Norðhús, brøðurnir Hjalti og Rógvi Josephsen.

Norðhús hevur í løtuni fleiri bæði smærri og størri arbeiði, bæði í og uttanfyri Klaksvík, sum hevur eini 40 fólk í arbeiði.

Eitt av størru arbeiðinum er 1000 fermetrar stóri bygningurin hjá Keypssamtøkuni í Klaksvík.

snorri@sosialurin.fo




*Fólkatalið á Norðoyri er nógv økt tey seinnu árini. Í mars mánaði komandi ár gerast tey enn fleiri, tá fólk fara at flyta inn í íbúðirnar sum byggifyritøkan Norðhús letur byggja her*

*Mynd: nordhus.fo*


